

Formaðurin í norska javnaðarflokkinum, Jonas Gahr Støre, helt í gjár røðu fyri ungdómunum á Utøya. Mynd: DNA

# Vil framleiða olju og gass sum higartil

Jógvan Hugo Gardar

09.08.2015 - 13:31

Oljan.fo

Formaðurin í norska javnaðarflokkinum, Jonas Gahr Støre, heldur at Noreg eigur at halda fram við at framleiða gass og olju sum higartil. Hann heldur ikki at Noreg skal minka um framleiðsluna, sambært eini samrøðu hann hevur havt við Dagens Næringsliv.

Í fjør fekk Støre rós frá ungdómsdeildini hjá flokkinum, AUF, tá hann segði at ein eigur at umhugsa at framleiða minni av olju og gassi fyri at verja umhvørvi. Men í ár er tónin ein annar, tí nú sigur Jonas Gahr Støre at neyðugt er at halda viðlíka framleiðsluna av gassi og olju.

- Eg meini tað sama sum eg segði í fjør. Tað var rætt at siga tað, og tað eg segði er tað sama sum nógv onnur taka undir við. Tað eg segði tekur støði í tí altjóða orkuráðið IEA hevur sagt um at tveir triðingar av fossilum brennievni eigur at verða liggjandi í jørðini. Meginparturin av hesum er kol, vísir Støre á í samrøðuni við Dagens Næringsliv.

Støre sigur at hann vónar at klimatoppfundurin í Paris kemur til eina niðurstøðu har prísurin á CO2 verður settur á ein hátt har tað sum dálkar minst verður rímiligari prísa enn annað brennievni.

- Vit eiga at hava sum mál at framleiða nógv av olju og gassi. Og vit eiga at gjøgnumføra tey leitiumførini sum liggja á borðinum og sum altjóða fyritøkur kenna til. Stóri trupulleikin er, sambært IEA, er kol, sigur Støre.